**NEI**

*Anfinn Kallsberg*
*Jógvan við Keldu*
*Jørgen Niclasen*
*Alfred Olsen*
*Marjus Dam*
*Gerhard Lognberg*
*Kristian Magnussen*
*Vilhelm Johannesen*
*Sverre Midjord*
*Páll á Reynatúgvu*
*Hergeir Nielsen*



**IKKI TIKIÐ STØÐU**

*Kjartan Joensen*
*Johan Dahl*
*Finnur Helmsdal*
*Høgni Hoydal*





**VIL IKKI SVARA**



*Henrik Old*

# Kollvelting fyri føroyskan politikk







*Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og uttast til vinstru, ávarar at broyta vallógina so tætt uppundir eitt val og sigur, at flokkarnir mugu fáa stundir til at umskipa seg eftir eini slíkari umfatandi broyting. Gestur Hovgaard, sosiologur, vísir á, at undir einum valdømi eiga kommunalu eindirnar samstundis at styrkjast. Og Bogi Eliasen, stjórnmálafrøðingur, sigur, at landspolitisku atlitini køvast undir núverandi skipan*

**Við bert einum valdømi verður løgtingið tvingað til at hugsa landspolitiskt, og vit sleppa undan teimum sterku lokalpolitisku atlitum, sum í dag eyðkenna tingarbeiðið, metir stjórnmálafrøðingurin Bogi Eliasen. Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, ávarar eina so umfatandi broyting so tætt uppundir val, og Gestur Hovgaard, sosiologur, mælir til sterkari kommunalar eindir, so útjaðarin undir einum valdømi ikki dettur niðurímillum**

**POLITIKKUR**
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

Nýggjar floksstrategiir. Eitt endurskoðað floksapparat. Ein øðrvísi landafrøðilig og sosial samanseting í løgtinginum. Sterkari kommunur. Og størri leiklutur til fjølmiðlarnar. Tað kunnu sambært serfrøðingunum Boga Eliasen, Gesti Hovgaard og Jógvani Mørkøre verða nakrar av avleiðingunum, um Føroyar verða skipaðar sum eitt valdømi. Men allir eru teir samdir um, at ein slík broyting fer at kollvelta føroyskan politikk.

## Oyðileggjandi lokalpolitikkur

Ein høvuðsgrundgeving fyri at skipa Føroyar sum eitt valdømi er, at landspolitisku atlitini við hesi broyting gerast sterkari enn tey lokalpolitisku. Og hesum tekur Bogi Eliasen, stjórnmálafrøðingur, undir við.

- Við núverandi skipan stendur hvør tinglimur einans til ábyrgd fyri síni egnu heimbygd ella valdømi, og tí kvalir núverandi skipan landspolitisku atlitini og reduserar tingarbeiðið til lokalpolitiska togtugan. Ein broyting frá sjey niður í eitt valdømi hevði sett landið heldur enn heimbygdina í fremstu røð, og tað er alneyðugt, um Føroyar skulu standa seg altjóða, metir Bogi Eliasen.

Tað snýr seg við øðrum orðum um, at við einum valdømi gerast allir veljarar áhugaverdir hjá øllum politikarum, og tá verður ikki nóg mikið bert at dyrgja í egnum valdømi.

- Núverandi skipan við sjey valdømum stavar eisini frá eini tíð uttan teir samskiftismøguleikar og tað undirstøðukervið, sum í dag bindur landið saman, metir Bogi Eliasen.

## Størri kommunalar eindir

Gestur Hovgaard, sosiologur, vísir eisini á, at tingarbeiðið í dag er ov merkt av smámálum og "petitessum", sum hann tekur til. Við eini nýggjari vallóg fær løgtingið størri rúmd til tey stóru og yvirornaðu málini. Men Gestur vísir eisini á vansarnar við bert einum valdømi.

- Vandin er, at summi øki detta niðurímillum og missa sína umboðan. Tí kundi ein millumloysn verið, at kommunurnar samstundis fáa fleiri málsøki at umsita og harvið størri vald. Nógv mál, sum hoyra heima í kommunalpolitikki, verða í dag viðgjørd í løgtinginum, og við sterkari kommunum kunnu vit kompensera tað tap, sum útjaðarin kann vera fyri, sigur Gestur Hovgaard. Eitt sjónarmið, sum Bogi Eliasen fleiri ferðir hevur víst á.

- Lítlar kommunur makta einki. Og saman við broytingini í vallógini eiga vit at styrkja útjaðaran við størri og sterkari kommunalum eindum, sum hava orku til at taka sær av tí lokalpolitiska og dagliga nærdemokratinum, metir Bogi.

## Fleiri vansar

Sambært Jógvani Mørkøre, stjórnmálafrøðingi, fer ein slík broyting at kollvelta føroyskan politikk. Og tí ávarar hann, at eitt slíkt umfatandi uppskot verður koyrt ígjøgnum beint uppundir eitt val.

- Tað er skeivt at broyta vallógina so tætt uppundir eitt val, tá uppstillingin langt síðani er farin í gongd. Reint praktiskt verður tað eitt kaos, tí flokkarnir mugu umskipast grundleggjandi, um tey sjey valdømini knappliga gerast til eitt. Eina slíka umfatandi broyting mugu flokkarnir fáa stundir til at umskipa seg eftir, sigur Jógvan Mørkøre.

Hann metir, at núverandi valskipan ikki er nóg góð, tí summi av valdømunum eru ov lítil. Men hesin trupulleikin kundi verið loystur, um t.d. Sandoyggin og Suðuroyggin løgdu saman í eitt valdømi og Norðstreymoy og Vágar eisini løgdu saman. So høvdu vit fimm valdømi.

- Eg taki ikki støðu til, hvørt tað er rætt ella skeivt at broyta vallógina. Men vit mugu gera okkum greitt, hvørjar avleiðingar ein slík broyting kann fáa, undirstrikar Jógvan Mørkøre.

Jógvan vísir eisini á politisku flokkarnar, sum eftir hansara tykki eru veikir við lítlari fyrisiting og avmarkaðari orku til at reka professionellan politikk. Og við bert einum valdømi ávarar samfelagsfrøðingurin, at flokkarnir gerast enn veikari, tí tá minkar ella hvørvur týdningurin hjá lokalfeløgunum kring landið.

- Rekrutteringin fer fram úti í valfeløgunum, og við bert einum valdømi missa tær flokspolitisku undirdeildirnar kring landið sín týdning. Í staðin kunnu vit fáa eina høvuðsstaðarrekruttering, og so er spurningurin, um vit fáa eina meiri einstáttaða uppstilling og samanseting í tinginum, bæði geografiskt og sosialt, sigur Jógvan Mørkøre.

## Fjølmiðlar størri leiklut

Fyri politikaran merkir broytingin til eitt valdømi, at tað ikki longur er nóg mikið bert at dyrgja í heimbygdini ella nærumhvørvinum. Og henda broyting fer sambært Gesti Hovgaard at geva fjølmiðlunum størri leiklut. Tí tá politikarar noyðast út at røkka fleiri veljarum, mugu teir fyrst og fremst gera tað gjøgnum teir landsdekkandi fjølmiðlarnar. Og tá verða nýggj krøv og øðrvísi eginleikar settir til bæði flokkar og framtíðar føroyska politikaran.